# í bygdini K



*Teir báðir elstu næmingarnir í 6. flokki sita saman. Tá skúlagongdin í heimbygdini er liðug, verður farið í skúla í Klaksvík*

## 1 + 1 kann blíva til 256

Við góðum stuðli frá eldra bróðuri sínum, sum gongur í 3. flokki, er Ivan longu farin at seta seg inn í loyndarmálini í rokningini.

Tað er vist okkurt um tað, at hetta fer at falla honum lætt.

- »Hvat er 1 + 1?«, vil bróðurin hava at vita. Teir eru jú komnir í skúla fyri at læra!

Ivan er skjótur at svara: »2«. »Hvat er 2 + 2?«, og svarið kemur beinanvegin: »4«.

Soleiðis ganga teir uppeftir, til teir koma til tøl, sum tann lítli ikki hevur tal á enn, »256«. Tá biður mamma teirra teir um at gevast, tí her fæst neyvan nakar endi á ramsuni.

Ivan gleðir seg eisini at fara at lesa og at skriva føroyskt. Enn er ov tíðliga at siga, hvørja lívsleið hesin nýggi næmingurin í Kunoyar skúla fer at velja sær - um tað verður tann bókliga ella handaliga.

- Tá eg verði liðugur við skúlan, fari eg at arbeiða hjá babba í Norðhús, sigur hann.

Tíðin vil vísa, hvussu vorðið verður. Tað er kortini altíð ein góður lutur at hava sett sær eitt mál her í lívinum.

### FAKTA

**754 farin í 1. flokk**
Í morgun eru Ivan Josephsen í Kunoy og 753 onnur børn kring landið farin í skúla á fyrsta sinni – tað eru 70 fleiri enn í fjør.
Tórshavnar kommunuskúli hevur flest næmingar, 573 í tali, meðan tann næststørsti er Eysturskúlin við 537 næmingum. Hoyvíkar skúli veksur skjótt í hesum árum, og eru 94 næmingar farnir í 1. flokk her í morgun.
59 fólkaskúlar eru kring landið. Í 16 teirra er næmingatalið lægri enn 8 børn.
Í alt eru 7273 fólkaskúlanæmingar í Føroyum hetta skúlaárið, ímóti 7367 farna skúlaár.

### FAKTA

**Næmingar í Kunoyar skúla**
Í Kunoyar skúla eru seks næmingar, Teir eru: Brøðurnir, Ivan Josephsen í 1. flokki og Jón Josephsen í 3. flokki
Systkini Sonja Michaelsen í 4. flokki og Arni Michaelsen í 6. flokki
Atli Andreasen í 4. flokki
Henning Svøðstein í 6. flokki